# Goymslufólk til MEST Tórshavn

**Hevur tú hug at arbeiða í einum spennandi umhvørvi á goymslu okkara í Havn?**

Vit selja alskyns útgerð til skip og virkir: mekaniskar vørur, stálvørur, hydraulikkvørur, el-vørur o.m.a. tilfar til vinnuna á sjógvi og landi. Sum goymslufólk verður tú partur av einum eldhugaðum goymslutoymi í tøttum samstarvi við goymslufólk okkara á Skála og í Runavík.

**Vit ynskja, at tú:** Ert áhugaður, sjálvstøðugur, røkin, ágrýtin og kundavinarligur.

Skrivlig umsókn við møguligum avriti av prógvum, royndum o.ø. skal sendast til:

**MEST Tórshavn**
**J.C. Svabosgøta 31**
**FO-110 Tórshavn**
Att.: Eirikur Joensen, goymsluleiðari

í seinasta lagi 15. mars 2011.

Hevur tú okkurt at spyrja um í sambandi við starvið, kanst tú venda tær til Eirik Joensen á telefon 79 11 77 ella við telduposti til eirikur.joensen@mest.fo.




75 *Skipasmíð og umvæling í 75 ár*

MEST
- ein álitandi samstarvspartnari

BYGMA
BALSLEV

## Bygma Balslev søkir...

**Sølufólk til køksdeildina.**

Vit gleða okkum til at fáa ein nýggjan dugnaligan køksseljara sum kann verða við til at menna okkara handil.
Vit sóknast eftir einum vinarligum persóni, ið dugir væl at tæna og vegleiða okkara kundum. Tú ert sølufólk við stórum "S" og dugir væl at samstarva.
Munandi partur av søluarbeiðinum er at vegleiða, tilboðsrokning, tilboðsuppfylging og vørubílegging.

Royndir frá líknandi starvi er ein fyrimunur men ikki krav.

Bygma Balslev kann bjóða tær eitt gott, trygt starv, við góðum arbeiðsfeløgum, og góðum umstøðum annars.
Lønin verður ásett eftir avtalu.

Ljóðar hetta áhugavert, so send okkum eina umsókn sum skjótast, og viðheft møgulig prógv og viðmæli.

Umsóknin skal verða okkum í hendi í seinasta lagi 4. mars.

Nærri upplýsingar fáast við at tosa við
Alex Hentze – alex@balslev.fo

**Bygma Balslev**



Bygma Balslev • Vegurin Langi • 188 Hoyvík • tlf. 345000 • www.balslev.fo

# KUNNGERÐ

### Stuðul til heilsu- og umhvørvistiltøk

Tórshavnar kommuna veitir stuðul á hvørjum ári til heilsu- og umhvørvistiltøk.

**STUÐUL VERÐUR LATIN TIL VERKÆTLANIR SUM:**

- Menna vitanina um heilsu og/ella umhvørvi
- Virka dálkingarfyribyrgjandi og/ella avmarkandi
- Virka orku – og tilfeingissparandi
- Kunna almenningin um heilsu- og/ella umhvørvisviðurskifti
- Verja landsløg, djóra- og/ella plantusløg

Til ber hjá stovnum, virkjum, feløgum og einstaklingum at søkja um stuðul.

Umsóknarblað og reglugerð fáast á www.torshavn.fo ella í Snarskivuni.

Umsóknir skulu verða Tórshavnar kommunu í hendi seinasta lagi 1. apríl 2011 og skulu sendast til:

**TÓRSHAVNAR KOMMUNA**
heilsu- og umhvørvisdeildin
Postboks 32
110 Tórshavnar kommuna

Stuðulin verður latin í umhvørvisvikuni, sum verður 9. til 15. mai 2011.

www.torshavn.fo

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

## Eysturoyar Røktar- og ellisheim

Til røktarheimið, Heimið á Mýrunum" og "Heiðastovu" verður søkt eftir

## FRÍTÍÐARAVLOYSARUM

fyri skjúkrrøktarfrøðingar, heilsurøktarar/ sjúkrahjálparar og heilsuhjálparar í tíðarskeiðnum 1. juni - 31. august 2011

**Umsóknarfreist:** 12.03.2011

Løn-og setunarviðursskifti sambært galdandi sáttmálar.

Nærri størvinum viðvíkjandi fæst at vita frá fyristøðumanninum á tlf. 478200 ella 478203.

Skrivlig umsókn saman við avriti av prógvi,viðmælum v.m. skulu sendast til:

**Eysturoyar Røktar-og ellisheim**
Att: fyristøðumaðurin
Friðartún
620 Runavík
ere@ere.fo